

*Havnarkórið sang á sjey ymsum málum – úr øllum Norðanlondum. Føroyar, mín móðir eftir Knút Olsen og Poul F. Joensen var føroyska parturin av samansettu norðurlendsku skránni*



*Vagn Holmboe og Karsten Hoydal gjørdu kantatuna Brúgvar til Norðurlandahúsið fyri tjúgu árum síðani. Tá sang Sanna í Brekkunum solo, og tað gjørdi hon eisini hóskvøldið - hesaferð saman við Ernst Sondum Dalsgarð*

# lamour

okkum so langt frá hesi leið. Húsið er ein perla, men uttan innihald – mentanina – er hon ein perla úr glasi.

Leggja vit stríðið millum fólksliga- og hámentan til síðis, so er einki at taka seg aftur í, at listarliga umhvørvið í Føroyum livir væl í Norðurlandahúsinum.

Men spurningurin er, hvussu long livitíðin verður, og hvørji høvini í framtíðini vera. Helga Hjørvar, stjóri, sigur, at Norðurlandahúsið í framtíðini ætlar at leggja seg eftir færri og størri tiltøkum, og tað kann geva rúmd til fleiri spælidagar hjá størru orkestrunum.

Tað riggaði eisini væl hóskvøldið. Umframt ymsar røður vóru bæði kór og symfoniorkestur á skránni.

Fyrst framførdi Havnarkórið við Òlavi Hátún sum dirigenti. Eftir tveir føroyskar sangir vóru átta sangir sungnir – ein úr hvørjum norðanlandi, har eitt nú løg hjá Edvard Grieg og Oskar Lindberg. Føroyar, mín móðir eftir Knút Olsen og Poul F. Joensen var føroyski parturin av samansettu norðurlendsku skránni.

Eitt samansett Føroyakór var eisini savnað til høvi. Og kórið sang millum annað Brúgvar, ið Vagn Holmboe og Karsten Hoydal gjørdu til upplatingina av Norðurlandahúsinum í 1983.

Tá sungu íslendingurin Guðmundur Jónsson og Sanna í Brekkunum solo. Tjúgu ár seinni sang Sanna aftur solo hóskvøldið. Hesaferð saman við úrmælinginum Ernst Sondum Dalsgarð.

Eftir ein steðg kom Føroya Symfoniorkestur á pallin. Framførd vórðu fýra norðurlendsk stykki, sum øll teljast millum tey kendastu norðurlendsku verkini. Síðst sang Føroya-kórið saman við Føroya Symfoniorkestri Eg oyggjar veit hjá Hans Jacob Højgaard og Fríðrik Petersen.

Í orðum ljóðar tað ikki av nógvum, men í innihaldið var hetta eitt stórt kvøld. Bæði fyri há ella lá var tað ein væl stílað framsýning av føroyskari mentan.

Spennandi verður at vita, hvat tey næstu tjúgu árini fara at geva av mentan og avbjóðingum.



*Martin Mouritsen stjórnaði sum vant Føroya Symfoniorkestri. Spæld vóru løg úr øllum Norðurlondum*